

# Woods aftur á vøllin

Besti golfspælarin í 21. øld hevur havt eina rættiliga turbulenta tilveru á privata hermótinum seinastu vikurnar, og hevur hann tí givið avboð til golfkappingar seinastu tíðina. Men nú fer tann stóri golfsnillingurin aftur á vøllin. Fyrsta kappingin Tiger Woods fer at taka lut í, verður ein golfkapping í amerikanska deilríkinum, Arizona, sum nevnist Accenture Match Play Championship. Accenture var annars ein av sponsorunum, sum breyt sponsorsamstarvið við Tiger Woods, tá tað kom fram, at Tiger Woods hevði havt fleiri síðuspring. Ivi var annars sáddur um Tiger Woods nakrantíð aftur fór at spæla golf aftur á høgum kappingarstøði. Men nú er heimsins besti golfspælari so klárur til at taka kappingina upp við heimselituna aftur.



Grannauppgerðin í Norðurstreymoy inniheldur nógvar dimensiónir hesaferð. Ikki minst ein fyri vestmenningar óhugnaligan møguleika fyri isolatión í botninum

# Framvegis tronligt

**Undan teimum báðum dystunum um vikuskiftið eru trý stig á muni millum nummar tvey og nummar seks. Tann munurin kann saktans minka aftur niður í tvey stig, so tøtt er kappingin**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Enn er støðan í Atlantic Airways-kappingini so tøtt sum sjáldan fyrr, og framvegis eru í veruleikanum fimm lið við í kappingini um at spæla FM-finalur ímóti Neistanum, samstundis sum tey royna at sleppa undan niðurflyting. Av tí at Team Klaksvík er klárt á odda í næstbestu deildini, er greitt, at eitt av teimum fimm liðunum fer at flyta niður, sum reglurnar eru nú.

Mikukvøldið spældu Kyndil og H71 javnt, so tí eydnaðist hvørgum teirra at sleppa stórvegis frá hinum. Sunnudagin skulu so hini fýra liðini spæla, og alt eftir, hvussu úrslitini laga seg, kann munurin millum tey fimm tøttu minka úr trimum niður í tvey stig.

KÍF og VÍF, sum spæla í Kollafirði, eru í løtuni tey bæði niðastu, við ávikavist 11 og 10 stigum. Vinna kollfirðingar, koma teir ájavnt H71 og Kyndli í stigum, men vinna vestmenningar, koma teir upp á 12 stig og allarhelst eitt fjórðapláss.

Í hinum dystinum tekur StÍF ímóti Neistanum, sum kemur inn á Skála við einum donskum landsliðsmálverja, sum eisini skal spæla steypafinaluna fyri Neistan. StÍF hevur ikki havt sítt besta kappingarár, og javnleikurin ímóti H71 fyri viku síðani var fyrsta stigið hjá strandingum síðani hálvan november! Hinvegin er Neistin favorittur hvørja ferð, og so verður eisini sunnudagin.

# VB heldur við Neistanum

**Vágskvinnur hava eina av meira ómøguligu uppgávunum í Klaksvík sunnudagin, men samstundis verður helst hugsað um, at StÍF ikki má fáa stig ímóti Neistanum**

Tað er ikki vanligt, at nakar tekur Stjørnuna á heimavølli í Klaksvík, so tí eru útlitini neyvan tey bjartastu hjá VB, sum stríðist fyri lívinum á aftasta plássi í Sunset-kappingini. Fær VB stig frá Stjørnuni, er tað ein sensatión.

Men samstundis ræður um hjá VB, at hini bæði liðini, VÍF og StÍF, ið liggja fýra stig framman fyri á stigatalvuni, heldur ikki fáa nakað burturúr. VÍF skal á útivølli spæla ímóti Tjaldri, sum neyvan ætlar at tveita nøkur stig burtur í Runavík, so Stjørnan skal eiga oddasessin púra ókeypis.

Hinvegin tekur StÍF á heimavølli ímóti Neistanum, ið kanska ikki hevur ta stóru motivatiónina, tí liðið kundi næstan longu nú fingið bronsuheiðursmerkini. Tí kann StÍF gera ein vørr her, so ikki er ringt at hugsa sær, hvørjum VB-fólkini munnu halda við í hesum dystinum…

**hil**

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 07/02 | 14.30 | StÍF-Neistin |
| 07/02 | 15.00 | Stjørnan-VB |
| 07/02 | 15.00 | Tjaldur-VÍF |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 07/02 | 16.00 | StÍF-Neistin |
| 07/02 | 16.00 | KÍF-VÍF |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 07/02 | 13.30 | KÍF-TB |
| 07/02 | 14.00 | ÍF-SÍ |
| 07/02 | 16.00 | Fleyr-Dráttur |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 07/02 | 16.00 | ÍF-SÍ |

# SÍ og TB fara avstað

**Tvey av fremstu liðunum møta teimum aftastu, so neyvan henda stórvegis broytingar í Eik-liguni hjá kvinnum. Hjá monnum er somuleiðis dystur millum tvey lið, sum eru 12 stig frá hvørjumøðrum**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Einki talar fyri, at nakað merkisvert úrslit verður at síggja í flogbóltskappingini um vikuskiftið, tí av teimum tilsamans fýra dystunum, sum eru á skránni, er tað bert kvinnudysturin millum Fleyr og Drátt, ið má metast at vera dystur millum tvey jøvn lið.

Hinvegin er tann dysturin ikki meira spennandi enn so, at hann er millum nummar fýra og fimm á stigatalvuni í Eik-liguni hjá kvinnum. Vinnarin kemur ikki hægri enn fjórðaplássið, men hevur so tvey stig niður til fimtaplássið. Dráttur vann herfyri tvær ferðir á rað á Fleyr, sum síðani ikki hevur víst nakra beinleiðis orsøk til, at liðið skal roknast sum favorittur sunnudagin.

Í hinum báðum kvinnudystunum skulu SÍ og TB á útivølli spæla ímóti teimum báðum niðastu liðunum, ávikavist ÍF og KÍF. TB kann ikki vænta sær trupulleikar í Kollafirði, og tað kann SÍ neyvan heldur vænta sær á Kambsdali, hóast ÍF í vikuni tók eitt sett frá Mjølnir. Við øðrum orðum fer TB at yvirhála Mjølnir, samstundis sum SÍ framvegis verður fýra stig á odda.

Fjórði dysturin er í Eik-liguni hjá monnum, har ÍF á Kambsdali tekur ímóti SÍ. Síðstu dystirnar hevur sæð út til, at sørvingar eru vorðnir munandi stinnari, meðan ÍF enn haltar langt aftanfyri og nokk mest hugsar um at spæla ungar menn inn á liðið, sum framtíðin kann byggja á. Her er SÍ stórfavoritturin, ið hevur beina kós í FM-finaluna ímóti Mjølnir.